Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# 10 ár síðani ljósið slóknaði

**Í dag eru 10 ár, síðani Diana prinsessa doyði í ferðsluvanlukku í París**



*Diana prinsessa og vinur hennara Dodi Fayed doyðu í bilvanlukku 31. august í 1997*

Tað var Tony Blair, forsætisráðharri, sum fann upp á hugtakið »Fólksins prinsessa«, og tað heitið hevur Diana havt líka síðani.

Men tað vóru tó neyvan bara orðini hjá Blair, sum gjørdu Dianu til nakað serstakt - ikki bara í bretska kongshúsinum, har hon av sonnum var nakað serstakt - men eisini langt uttan fyri bretska heimsveldið. Hvussu mong okkara minnast ikki, hvar vit vóru, tá vit fingu deyðsboðini av prinsessuni, og hvussu mong munnu ikki minnast teir túsundtals grátandi bretarnar í gøtunum í London, tá Elton John sang um rósuna, sum var deyð, og ljósið, sum var slóknað.

At Diana ikki er gloymd sæst uttan fyri Kensington Palace í hesum døgum, har fólk í hópatali og úr øllum heraðshornum koma at minnast deyða hennara fyri 10 árum síðani. Men vanlukkan í tunlinum í París er heldur ikki gloymd, og enn tann dag í dag verður gitt, hví hon doyði, og um tað var ein vanlukka ella okkurt annað.

# Skeivt at slaka fyri Taleban

**- Tað var skeivt av Suðurkorea at tingast við Taleban um gíslarnar. Tað høvdu vit ikki gjørt, sigur týski kanslarin**



*Sambært suðurkoreonskum bløðum fekk Taleban tvær mió. dollarar fyri gíslarnar*

Angela Merkel er sera misnøgd við, at suðurkoreanska stjórnin játtaði at tingast við Taleban um teir suðurkoreonsku trúboðararnar, sum Taleban burturflutti í Afghanistan.

- Taleban hevur eisini burturflutt ein týskan verkfrøðing, men suðurkoreanska framferðin fær ikki okkum at broyta mannagongd, sigur Angela Merkel við týskar fjølmiðlar í dag.

Hon er ikki einsamøll um misnøgdina. Kanadiski uttanríkisráðharrin, Maxime Bernier, sigur við BBC, at avgerðin hjá suðurkoreonsku stjórnini at slaka fyri Taleban fer uttan iva at elva til fleiri burturflytingar í Afghanistan.

Suðurkoreanskir fjølmiðlar skriva í dag, at stjórnin hevur goldið Taleban tvær mió. dollarar í loysigjaldi fyri teir seinastu 19 gíslarnar. Tilsøgnin um at taka teir suðurkoreonsku hermenninar úr Afghanistan í hesum árinum hevur minni týdning, tí tað ætlaði Suðurkorea at gera kortini, skriva suðurkoreonsk bøð í dag.

## STUTT SAGT

### Peru tørvar hjálp

Nógv fólk, sum mistu húsini í tí harða jarðskjálvtanum í Peru fyri tveimum vikum síðani, hava framvegis einki at búgva í. Harafturat kæra hjálparfelagsskapirnir seg um, at teir hava ov lítið av heilivági, tjøldum, teppum, mati og vatni. Talsmaðurin hjá Læknum uttan Landamark í Peru sigur við Reuters, at í einum býi, sum hann hevur vitjað, var alt javnað við jørðina. Minst 500 fólk doyðu í jarðskjálvtanum tann 15. august, og umleið 200.000 gjørdust heimleys ella vórðu rakt á annan hátt.

### Hermenn tiknir til fanga

Víðgongdir islamistiskir hermenn í Pakistan kringsettu í gjár eina deild hjá pakistanska stjórnarherinum, og minst 120 stjórnarhermenn vórðu tiknir til fanga. Stjórnarhermenninir vóru nærhendis afghanska markinum, tá teir brádligu blivu kringsettir. Teir løgdu vápnini uttan at gera mótstøðu. Í nátt vóru samráðingar um at fáa hermenninar leysar, og ætlandi skuldu teir sleppa leysir seinni í dag. Pakistanska herleiðslan royndi í gjárkvøldið at avsanna, at stjórnarhermenninir vóru tiknir, men noyddist seinni at viðganga tað.

### Saman-stoytur á sjónum

Eitt ferðamannaskip og eitt fiskiskip stoyttu saman stutt úr landi úti fyri ísraelska havnarbýnum Haifa í gjárkvøldið. Ísraelska vaktartænastan sigur, at fiskiskipið sakk beinanvegin, og at leitað verður eftir tveimum monnum, sum vóru við tí. 14 mans vóru við fiskiskipinum, og 12 teirra vórðu bjargaðir beint eftir vanlukkuna. Í nátt leitaðu ísraelskar tyrlur eftir teimum báðum seinastu monnunum, men uttan úrslit.